## Tøkk

Vit takka hjartaliga øllum sum sýndu samkenslu tá okkara kæri pápi, verpápi, abbi og langabbi

**Samuel Bringsberg**
vanliga nevndur Sam

andaðist og varð jarðaður.

Ein serstøk tøkk til Hans Eiler prest fyri góð og lívgandi orð.
Tøkk til starvsfólki á Sambýlinumí Bøgøtu og starvsfólki á Deild M sum vóru um hann ta tíðina hann var har.
Tøkk til kirkjutænarar, berarar, sangarar og tykkum sum hjálptu til við ervinum.
Tøkk til øll somul sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað her á fold.

**Torbjørn, Eivinn og Anita v/ familju**

# Baka saman við nissumammuni

**Hesa vikuna bjóðar SMS øllum børnum at baka smákøkur við hugnaliga jólabýin á Torginum**

JÓL
*Tíðindaskriv*



Aftur hesa vikuna skipar SMS fyri stórum og forvitnisligum barnatiltakið á Torginum. Hesaferð bjóða tey børnunum at baka smákøkur saman við nissumammuni og hjálparfólkum hennara í fittu jólahúsunum, sum standa við hugnaliga jólabýin á Torginum.

Á Torginum verða tvey jólahús og eisini verða sett upp borð, har børnini kunnu leggja deiggið í formar. Tá ið hetta er gjørt, verða formarnir latnir nissumammuni ella einum av hjálparfólkum hennara, sum síðani baka køkurnar.

Børnini kunnu so taka køkurnar við sær heim, ella kanska eta tær í SMS. Hós- og fríggjamorgunin millum kl. 10.00-12.00 bjóða vit børnum úr vøggustovum og barnagørðum á gólvið at baka. Tá ið tey eru liðug at baka, bjóðar MBM ein pakka av skúlamjólk, sum kann drekkast afturvið matpakkanum.

Annars ber eisini til hjá børnum at baka hósdagin millum kl. 15.00-17.30 og leygardagin millum kl. 11.00-14.00. Tiltakið er ókeypis.

Fríggjadagin millum kl. 15.00-19.00 bjóðar nissumamman ókeypis heitar aflur til øll vitjandi.

# Seinkað blaðútbering

BLAÐÚTBERING
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Tey, ið halda bløðini Sosialin og Dimmalætting, kendu aftur í gjár sviðan av seinkaðari blaðútbering í høvuðsstaðarøkinum.

Leygardagsblaðið, ið átti at verið borið út fríggjakvøldið, kom ikki vegin fram fyrr enn leygardagin vegna prenttrupulleikar á Prentmiðstøðini. Hetta brekið varð tó rætta um vikuskiftið, og vórðu bløðini tí prentað sum vant mánadagin.

Men har ein skriðan er lopin er onnur væntandi. Tað kundu tey á Dimmalætting sanna, tí tá Dimmalætting varð gjørd klár til prentingar mánadagin, gekk fotosetarin fyri. Filmarnir hjá Dimmalætting máttu tí gerast á Sosialinum, og førdi hetta við sær, at prentingin av Dimmu varð seinkað. Hetta førdi aftur við sær, at haldarar í høvuðsstaðarumráðnum ikki fingu bløðini til tíðina í gjárkvøldið.

– Blaðboðini hjá Prentmiðstøðini bera bæði Sosialin og Dimmalætting út samstundis, og tá annað blaðið hevur slíkar trupulleikar, so bíða vit vanliga at fara út, til bæði bløðini eru klár, sigur Hallstein Sigurðsson, sum hevur blaðútberingina hjá Prentmiðstøðini um hendi.

# Hjólið á Shell-støðunum

**Nýggja tíðindaskrivið hjá áhugafelagnum Føroya Ellisakfør, Hjólið, fyri november 2003 er útkomið. Blaðið er at fáa á Shell-støðunum kring landið**

TÍÐINDASKRIV




»Hjólið« er navnið á nýggja tíðindaskrivinum hjá áhugafelagnum Føroya Ellisakfør.

Blaðið kom fyrstu ferð út um ólavsøkumundið sum ein avís í tabloid stødd (A3). Hjólið avloysti blaðið »Tíðindaskrivið Føroya Ellisakfør«, sum var í A5 stødd og kom regluliga út til limir felagsins síðan 1992 og seinni eisini í leysasølu.

Føroya Ellisakfør hava gjørt avtalu við Føroya Shell um, at »Hólið« verður selt á Shell-støðunum kring landið.

Í blaðnum eru áhugaverdar greinar um t.d. ein túr við føroyskum ellisakførum í Hetlandi, eina áhugaverda vitjan í Autostadt í týska býnum Wolfsburg, um gamla vatnbrunnin við Gráastein í Havn, sum limir í Føroya Ellisakførum eru í ferð við at seta í stand til bilasavn, minningarorð um kendar persónar í bilvinnugreinini, annar partur av bilasøguni í Vágum, sum krimirithøvundurin, Einar Petersen, sáli, hevur skrivað, gamlar myndir í samband við at Vauxhall bilar hava verið gjørdir í 100 ár.

Hjólið kostar 20 krónur at keypa á Shell-støðunum.

# Færri ferðafólk triðja mánað á rað

**Aftur í november, triðja mánað á rað, er ferðafólkatalið um flogvøllin í Vágum nakað minni enn sama mánaða í fjør**

FLOGFERÐSLA



Í november í ár fóru og komu 8.936 ferðafólk um floghavnina. Hetta er ein afturgongd uppá 3,6% í mun til november í fjør, tá 9.269 fóru og komu um floghavnina. Í november hevur afturgongdin verið á øllum leiðum uttan Bretlandsleiðini – tvs. leiðin til og úr Aberdeen. Her hevur framgongdin verið 59,3%.

Stóri vøksturin í ferðafólkatalinum fyrr í ár ger tó, at samlaða ferðafólkatalið higartil í ár er størri enn sama tíðarskeið í fjør. Frá januar til november eru íalt 153.073 farin og komin um floghavnina. Hetta er 3,8% fleiri enn sama tíðarskeið í fjør, tá talið var 147.499.

Fráferðirnar og komurnar hava somuleiðis verið færri í november í ár í mun til í fjør. Íalt eru 396 flogfør komin og farin í mun til 424 flogfør sama tíðarskeið í fjør. Hettar svarar til eina afturgongd uppá 6,6%. Í tíðarskeiðnum januar til november á ár eru tilsamans 4.884 flogfør komin og farin í mun til 4.900 sama tíðarskeið í fjør. Hetta er ein lítil afturgongd uppá 0,3%.

Flutningur av luftgóðsi er í november í ár øktur við 25,1% frá 28,3 tonsum til 35,4 tons. Fyrstu 10 mánaðarnar í ár var mongdin av luftgóðsi økt við 6,6% frá 323,1 tonsum til 344,3 tons. Luftposturin er framvegis nakað minni í ár. Fyrstu 10 mánaðarnar er luftposturin minkaður við 4,1% til 547,5 tons.



# Granskari í andgletti



*Bent Jensen, professari, sum ger kanning av viðurskiftunum millum Føroyar og Sovjet undir kalda krígnum, skal nú gera kanning av innanlendis viðurskiftunum í Danmark*

**Granskarin Bent Jensen, sum ger frágreiðingina um viðurskiftini millum Føroyar og Sovjetsamveldi er í andgletti**

KANNING
*Øssur Winthereig*
*ossur@sosialurin.fo*

Granskarin, sum hevur granskað viðurskiftini millum Føroyar og Sovjetsamveldið undir kalds krígnum, er enn einaferð í andgletti.

Danska stjórnin hevur játtað honum fýra milliónir krónur til gransking av innanlendis viðurskiftunum í Danmark undir kalda krígnum. Peningurin er játtaður persónliga til Bent Jensen, sum er professari við lærda háskúlan í Odense.

Danski fólkaflokkurin gekk á odda í samráðingunum um donsku fíggjarlógina, at pengar skulu seta av til Bent Jensen.

### Givið úrslit

Atfinningarnar eru millum annað, at talan er um bílagda gransking, tí Bent Jensen ikki fýrir fyri at nevna seg antikommunist. At úrslitið av kanningini er givið upp á forhond.

Bent Jensen sjálvur ræðist ikki fyri at svara aftur.

Í eini samrøðu við danska blaðið Politiken sigur hann:

- Nei tað er eingin, sum kann bíleggja meg til nakað sum helst. Fyri meg er hetta rein søgugransking.

### NATO kanning

Eftir at kanningar av viðurskiftunum millum NATO og Føroyar vóru gjørdar og almannakunngjørdar, var avgjørt eisini at kanna viðurskiftini millum Sovjetsamveldið og Føroyar.

Sámal Tróndur Finsson og Jákup Thorsteinsson skrivar kanningar um NATO og kalda kríggið. Fyrsti partur kom út í sonevndu svørtu bók. Seinni var eitt ískoyti gjørt.

Anfinn Kallsberg løgmaður boðaði í mars 2001 í Løgtinginum frá, at Bent Jensen skuldi gera Sovjetkanningina. Og í hesum døgum situr Bent Jensen í Italia og skrivar seinastu orðini í kanningini av sambandinum millum Føroyar og Sovejtsamveldið.



*Fólk í føroysku friðarrørsluni mótmæla vitjan av amerikanskum herskipi í Havn. Høvdu tey tætt tilknýti til Sovjetsamveldi, skal nýggja kanningin vísa*

### Sambandið við Sovjet

Í kanningini, sum Bent Jensen skal gera um innanlendis viðurskiftinki í Danmark undir kalda krígnum, væntar hann, at hann eisini kannar persónlig sambond, sum hava verið millum fólk í Danmark og Sovjetsamveldinum.

Ein av kanningarsetningin frá landsstýrinum er "At lýsa, í hvønn mun føroyingar, føroysk feløg og føroyskir myndugleikar luttóku tilvitað og/ella ótilvitað sum umboðsmenn, njósnarar ella loyniumboð hjá Sovjetsamveldinum og tess sameindu."

Í frágreiðingini hjá løgmanni um uttanríkisviðurskifti verður lýst, hvørjar vónir landsstýrið hevur til kanningina hjá Bent Jensen

- Skjalarannsóknir í Russlandi eru torførar at fremja í verki vegna tess, at russiskir myndugleikar einans loyva søgugranskarum at skriva skjøl á søvnum teirra av við hond. Sostatt er ikki loyvt at taka avrit av skjølum. Bent Jensen, professari, er leiðari á slavisku deildini við Lærda Háskúlan í Odense og er kønur í russiskum máli og politiskum viðurskiftum í Russlandi. Harumframt hevur hann drúgvar royndir av skjalarannsóknum í Russlandi.

## Fakta

### Hernaðarkanningin eystanfyri

Kanningarsetnurin, sum var latin Bent Jensen, professara:

1. At lýsa trygdarpolitisku støðu Føroya í kalda krígnum, sum Sovjetsamveldið og tess sameindu (Varsjavasamgongan) mettu hana.
2. At lýsa hernaðarligt virksemi hjá Sovjetsamveldinum og tess sameindu á landi í Føroyum, á føroyskum havleiðum og í føroyskum loftrúmi.
3. At lýsa, í hvønn mun Sovjetsamveldið og tess sameindu høvdu eina serstaka hernaðarliga ætlan (strategi) mótvegis Føroyum, eins og tey eyðvitað høvdu mótvegis Danmark.
4. At lýsa fregnarvirksemið hjá Sovjetsamveldinum og tess sameindu í Føroyum umframt uttanlands Føroyum viðvíkjandi.
5. At lýsa, í hvønn mun føroyingar, føroysk feløg og føroyskir myndugleikar luttóku tilvitað og/ella ótilvitað sum umboðsmenn, njósnarar ella loyniumboð hjá Sovjetsamveldinum og tess sameindu.
6. At savna saman viðkomandi skjalatilfar í skjalasøvnum hjá Sovjetsamveldinum og, um umstøðurnar tala fyri tí, eisini í Eysturtýsklandi og á NATO høvuðsstøðini í Brússel til tess at greiða tann yvirskipaða setningin.